# Passar lykilin er skutarin tín

SPÆL OG VINN
*Tíðindaskriv*

Hesa vikuna hevur Bridgesamband Føroya forvitnisligt tiltak á Torginum í SMS. Tiltakið verður gjørt, til tess at savna pening inn til luttøkuna hjá føroyska bridgelandsliðnum í EM-kappingini, sum verður í Italia í juni mánaði.

Hesar dagarnar, tiltakið hjá Bridgesambandið Føroyar er á Torginum í SMS, er møguleiki at vinna ein scootara, umfram aðrar vinningar, sum handlar í SMS hava latið.

Allar dagararnar sita umboð fyri Bridgesambandið á Torginum og selja lyklar. Saman við lyklinum verður útflýggjaður ein lutaseðil. Høvuðsvinningurin er ein scootari frá AD Import. Tað er nevnliga soleiðis, at ein av teimum mongu lyklunum, sum verða seldir á Torginum hesar dagarnar, hoyrir til lásið á scootarinum. Tann, sum eigur lykilin, sum passar í lásið, vinnur scootarin, sum hevur eitt virði á kr. 20.000,00. Sølan av lyklum fer fram allar dagarnar, líka til leygardagin kl. 12.00. Ímillum kl. 12.00-14.00 leygardagin ber so til at royna, um lykilin, sum tú hevur keypt, passar í lásið á scootarinum. Umframt at ein vinnari skal finnast til scootarin, verður eisini drigið millum allar seldar lyklar á Torginum hesar dagarnar. Í hesum dráttinum, sum fer fram á Torginum kl. 14.00, verða íalt ellivu vinningar burturlutaðir.

Meðan tiltakið er í SMS, er eisini møguleiki at spæla ella læra seg bridge. Á Torginum eru nevnliga sett upp borð, við spælikortinum, og teimum meldikassum, sum verða nýttir í bridge. Eisini verða bridgebøkur, sum vitjandi kunnu keypa ella blaða í. Svend Novrup, sum er landsliðsvenjarin hjá føroysku bridgelandsliðunum, verður á Torginum allar dagarnar frá kl.

13.00. Hann hevur givið ein rúgva av bókum út, um m.a. bridge, Tour de France og fótbólt. Seinasta bók hansara er um HM-søguna í fótbólti fram til dagin í dag. Hann fer m.a. at selja og signera hesa bókina, umframt hann selur aðrar bøkur um spøl á Torginum.

Hósdagin kl. 16.00 fer Ragnar í Vík saman við ørðum tónleikarum á pallin. Teir fara at framføra løg av fløgunum, sum Ragnar hevur givið út.

Fríggjadagin kl. 15.00 bjóða landsliðsleikararnir av í bridge. Ætlanin er, at tey sum bjóða landsliðsleikarunum av, og fáa positiva "skoru", fáa ein kaffimunn og eina serliga bridgekøku.

Kom á Torgið í SMS hesa vikuna, og tú kanst verða hepni vinnarina av einum spildurnýggjum scootara.

## VIÐMERKINGAR

# Kjarnan í føroyska fólkinum valdi FULLVELDIS-TILGONGDINA

**Abraham Mikladal**



Jørmund Vágadal spennir seg út og sigur, at føroyingar ikki valdu loysing. Tann spurningurin hevur bert einaferð verið settur, og tá var svarið JA (1946)

Hinvegin kann sláast fast, at bæði Fólka-, Sjálvstýris- og Miðflokkurin ynskja einar sjálvstøðugar Føroyar. Tað siga teir heilt greitt. Hygg eftir hvat t.d. Fólkaflokkurin hevur sagt og sigur:

**I**
*Hin føroyski Fólkaflokkurin (radikalt sjálvstýri) er ein liberalur, sosialur og demokratiskur sjálvstýrisflokkur.*

**II Tjóðskaparmálið**
*Tjóðskaparliga stavnhald fólkafloksins er, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Hetta ber í sær, at endamál floksins er fult sjálvstýri fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á øllum økjum og úteftir telja við sum suverenur statur javnbjóðis øðrum sjálvstýrandi londum. (Stevnuskrá Fólkafloksins)*

-------

*"Løgtingssamtyktin um føroyskt sjálvstýri skal fylgjast. Sjálvstýristilgongdin er komin í eina trygga legu, soleiðis at vit innan avtalaða tíðarætlan (2012) kunnu taka fulla ábyrgd av øllum málsøkjum bæði politiskt, umsitingarliga og fíggjarliga." (Valskrá Fólkafloksins 2002)*

**Her er einki at fara skeivur av.**
At flokkurin ikki fekk eitt einsgott valúrslit, sum hann hevði ynskt, kann so als ikki rættvísgera at hann skal ganga burtur frá tí hann er og hevur sett sær fyri.

Hugsa tær um Tjóðveldisflokkurin hevði blivið sambandsflokkur um hann misti 1 ella 2 tingmenn, ella at Sambandsflokkurin bleiv tjóðveldisflokkur, tí hann gekk aftur?

Lat okkum bara sláa fast, at teir flokkar, ið hava sum stevnu at skapa Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð, hava meiriluta á tingi.

Um onkur sambandsmaður er vilstur inn í onkran av hesum flokkum, so eigur hann at hálsa um ella finna sær annan flokk at virka í.

# Barnasjónleikarastevna í Havn

BARNASJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 25. mai skipar Meginfelag Áhugaleikara Føroya, MÁF, fyri Barnasjónleikarastevnu í Havn.

Frá klokkan 10 - 15 hendan dagin fara 7 bólkar við tilsamans 80 børnum at spæla sjónleik í býnum. Ætlanin við stevnuni er, at børn, sum arbeiða við sjónleiki í skúlanum og í frítíðini, fáa høvi at spæla sjónleik fyri øðrum børnum og síggja, hvussu aðrir bólkar arbeiða.

Fyrsta barnasjónleikarastevna MÁF's var í fjør. Ætlanin er, at barnasjónleikarastevnur skulu vera við jøvnum millumbilum. Tiltakið er eisini hugsað sum eitt gott høvi hjá lærarum at arbeiða við drama og sjónleiki í fólkaskúlanum.

Spælt verður í Grasagarði og á Meiarínum leygardagin. Bólkarnir, sum eru við hesaferð, eru: Sandoyar Meginskúli, Sjónleikaraskúli Havnar Sjónleikarfelags, Fuglafjarðar Sjónleikarafelag, Venjingarskúlin, Nólsoyar Sjónleikarskúli og Dramaverkstaðið. Sýningarnar eru ókeypis, og vónar MÁF at síggja nógv fólk, bæði stór og smá.

<u>Skráin er hendan:</u>
Kl. 10[15]-10[45]: Sjónleikaraskúli Havnar Sjónleikarfelags spælir leikin "Skipið Útsynningur" (Meiaríið)

Kl. 10[50]-11[05]: Venjingarskúlin spælir leikin "Kýsareyða"(Meiaríið)

Kl. 11[15]-11[45]: Sandoyar Meginskúli spælir leikin "Tá ið trøllið rændi prinsessuna" (Meiaríið)

Kl. 12[30]-13[00]: Dramaverkstaðið spælir leikin "Annarleiðis" (Meiaríið)

Kl. 13[15]-13[45]: Børn úr Fuglafjarðar Sjónleikarafelag spæla leikin "Brúsajøkul" (Grasagarði)

Kl. 13[45]-14[00]: Nólsoyar Sjónleikaraskúli vísir klovnaleik (Grasagarði)

Kl. 14[15]-14[45]: Sjónleikaraskúli Havnar Sjónleikarfelags spælir leikin "Tá mánin setur og sólin rísur" (Meiaríið)

# Fá tær ein góðan látur í Sjónleikarhúsinum

LÁTUR
*Tíðindaskriv*

Mikudagin 22. mai fekk Sjónleikarhúsið vitjan úr Noregi. Tað er Molja Revyteater, sum hevur lagt sær leiðina hendanvegin.

Molja Revyteater er ein av bólkunum rundan um "Teaterfabrikken" í Ålesund, og er hesin bólkurin eitt sonevnt "mobil-teatur", ið ferðast runt í Noregi og undirheldur við skemti og revy. Bólkurin er sera nógv um-biðin til undirhald av tí léttara slagnum, bæði til brúdleyp, jólaborðhald og mangt annað, har tey gera skemt burtur úr tí lokala umhvørvinum á staðnum.

"Du ringer, vi springer," siga tey. Fimtan fólk eru við í bólkinum, bæði sjónleikarar og tónleikarar. Hóast einans 6 ár á baki er bólkurin millum teir vinsælastu og mest eftirspurdu í Noregi. Tað sigst, at áskoðarar flenna við tárum, tá ið tær koma: "Byens pene, modne damer, som ikke er så fornemme, som de ser ut".



*Molja Revyteater er ein av bólkunum rundan um "Teaterfabrikken" í Ålesund, og er hesin bólkurin eitt sonevnt "mobil-teatur", ið ferðast runt í Noregi og undirheldur við skemti og revy. Í kvøld, fríggjakvøldið og leygarkvøldið undirhalda tey í Sjónleikarhúsinum í Havn*

Onkuntíð er Molja Revyteater biðið um at undirhalda pensjonistum, sum akkurát hava sett seg til borðs at fáa sær ein bita. Inn koma nakrar gamlar, ófantaligar vaskikonur og fara við brestin at vaska gólvið. Ja, øll mugu so flyta seg, og lyfta beinini upp….

Nú hevur Molja Revyteater sett saman eina revy til føroyingar, sum ætlanin er at undirhalda okkum við í Sjónleikarhúsinum í Havn:

- hósdagin 23. mai kl. 20
- fríggjad. 24. mai kl. 20
- leygardagin 25. mai kl. 16

Atgongumerkini eru at fáa í Kunningarstovuni í Havn frá týsdegnum 21. mai, allar vanligar upplatingartíðir, og í Leikhúskaféini í Sjónleikarhúsinum frá týsdegnum 21. mai kl. 14-17.

"Alt kan skje når denne gjengen er invitert!"



Búskapur og vinna:
## Ímóti handilskvotum

Norski fiskimálaráðharrin Svein Ludvigsen hevur boðað frá, at hann fer at leggja fram uppskot, sum skal bera í sær, at kvotur kunnu seljast og keypast. Ráðharrin heldur, at handilskvoturnar fara at bøta um lønsemið í fiskivinnuni, og at skipanin fer at forða fyri, at kvoturnar verð savnaðar á fáum hondum.

Men í fiskimannafelagnum í Sunnmøre og Romsdal taka teir ikki undir við ráðharranum. Har bera teir ótta fyri, at ein skipan við handilskvotum fer at gera enda á útróðrinum.

## Dýrur formansskapur

Upplýsingar, sum stjórnin í Keypmannahavn hevur latið fíggjarnevndini hjá Fólkatinginum, vísa, at tað fer at kosta Danmark næstan eina mia. krónur at hava formansskapin í ES seinna hálvár í ár. Løgmálaráðharrin Lene Espersen hevur biðið um smáar 600 mió. krónur í eykajáttan til løgregluna. Løgreglan hevur mett, at einir 4000 løgreglumenn skulu nýtast til at veita ta neyðugu trygdina. Uttanríkisráðið metir, at tað fer at kosta einar 350 mió. krónur at halda teir 180 fundirnar, sum verða í Danmark teir seks mánaðarnar.

## Eiga at framleiða meiri

Norski oljumálaráðharrin Einar Steensnæs boðaði í síðstu viku frá, at Noreg fer ikki at økja sína oljuframleiðslu, hóast russar hava kunngjørt, at teir fara at økja framleiðsluna. Noreg, Russland og OPEC samdust í desember um at skerja framleiðsluna fyri at fáa prísin upp, men nú vilja russar sleppa burtur úr avtaluni.

Norski marknaðarserfrøðingurin Arnstein Wirgstrand heldur, at stjórnin eigur at taka sama stig sum russar. Hann vísir á, at oljuprísurin er komin í ta leguna, sum OPEC og hini oljulondini ætlaðu, og tað fer ikki at ávirka prísin, um Noregt hækkar sína framleiðslu aftur, sigur hann. Noreg lækkaði í desember sína framleiðslu 150.000 tunnur um dagin.

## UTTAN ÚR HEIMI

# Bush fekk ikki ávaringina

**Ein frágreiðing hjá FBI, sum ávaraði ímóti monnum hjá Osama bin Laden, varð ongantíð latin amerikanska forsetanum. Heldur ikki løgmálaráðharrin fekk hana**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Amerikanska blaðið New York Times avdúkaði í gjár, at hvørki George W. Bush, forseti ella John Ashcroft, løgmálaráðharri fingu nakað at vita um skjalið hjá FBI, sum í juli í fjør ávaraði um vandan fyri, at viðhaldsmenn hjá yvirgangsmanninum Osama bin Laden kundu fara at skipa fyri yvirgangi í USA.

New York Times skrivar, at John Ashcroft, løgmálaráðharrin og Robert Mueller, stjóri í FBI vórðu ikki kunnaðir um frágreiðingina fyrr enn nakrar dagar aftan á atsóknirnar tann 11. september. Bush forseti frætti ikki um frágreiðingina fyri enn fyri stuttum.

Amerikanskir tænastumenn váttaðu fyri blaðnum í gjár, at heldur ikki leiðslan í Kongressini visti nakað um ávaringina hjá FBI.

Bush forseti hevur verið fyri hvøssum atfinningum í seinastuni, eftir at tað er komið fram, at samveldisløgreglan longu í juli ávaraði um, at menn hjá bin Laden kanska fyrireikaðu yvirgang í USA. Sambært New York Times verða atfinningarnar nú væntandi vendar ímóti FBI. Tey atfinningarsomu halda, at samveldisløgreglan átti at tikið ávaringina í størri álvara, og at løgmálaráðharrin átti atverið kunnaður um hana.



*Longu í juli í fjør ávaraði FBI um, at menn hjá Osama bin Laden kundu hava ætlanir um atsóknir í USA. Ikki fyrr enn í vár fekk George W. Bush, forseti at vita um ávaringina*

*Mynd: Reuters*

Kanningar hjá New York Times hava víst, at FBI-agenturin Ken Williams skrivaði frágreiðingina tíðliga í juli, og at hann tann 10. juli sendi høvuðs-skrivstovuni hjá FBI hana. Har varð frágreiðingin lisin, men tey, sum lósu hana, kunnaðu ikki sínar leiðarar um innihaldið.

Tey, sum finnast at myndugleikunum, umrøða eisini eitt annað skjal. Tað var ein fregnartænastufrágreiðing, sum Bush forseti fekk tann 6. august í fjør. Í frágreiðingini varð sagt, at al-Qaeda møguliga fyrireikaði seg til at ræna amerikansk flogfør. Higartil hava Hvítu Húsini sýtt fyri at taka hetta skjalið framaftur.

# Lova hvør øðrum hóskandi svar

**Indiski forsætisráðharrin vitjaði í gjár indiskuhermenninar í Kashmir**

KASHMIR-STRÍÐIÐ
*Árni Joensen*

Viðurskiftini millum grannalondini India og Pakistan gerast alt meiri spent, sum dagarnir ganga. Indiskir politikarar og talsmenn leggja hvør annan undir at hava økt spenningin, samstundis sum bæði londini flyta hermenn í stórum tali til markið í Kashmir. Eygleiðararhalda, at umleið ein millión hermenn eru við markið nú.

Indiski forsætisráðharrin, Atal Behari Vajpayee, vitjaði í gjár teir indisku hermenninar í Kashmir. Har gjørdi hann greitt, at India fer atverja síni rættindi, sama hvat krevst.

Hann hevði ikki meiri enn sagt orðini, tá pakistanski herovastin svaraði aftur. Hann segði, at fer ein tann einasti indiski hermaðurin inn á pakistanska jørð, skal India vænta sær hóskandi svar. Herovastin segði einki um, hvat hann metti vera hóskandi svar.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur heitt á stjórnirnarí teimum báðum londunum um atsissa seg og at setast viðsamráðingarborðið heldur enn at taka vápnini fram. Amerikanska stjórnin boðaði í gjár frá, at hon fer at senda varauttanríkisráðharran til India og Pakistan at tosa við myndugleikarnar har.

Úr Norðurlondum:
## Steingjast fyri svium

Svenski ráðharrin Mona Sahlin hevur rættiliga fingið øði í nógvar danskar politikarar, tí hon í einari sjónvarpssending hevur funnist at danska innflytarapolitikkinum. Bæði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri og Bertel Haarder, ráðharri í innflytaramálum vísa atfinningunum aftur, og formaðurin í Danska Fólkaflokkinum, Pia Kjærsgard, hevur skotið upp at steingja Oyrasundsbrúnna, um ov nógvir innflytarar seta seg niður í Svøríki fyri at forða fyri, at teir ikki sleppa til Danmarkar.

## Nalvin skal fjalast

Skúlastjórin á einum skúla í Marienlyst í Oslo hevur givið boð um, at í framtíðini skulu genturnar ganga í klæðum, so nalvin ikki kemur undan, og tær sleppa heldur ikki at vísa ov nógv av beinunum. Somu boð hava teir kvinnuligu lærararnir á skúlanum fingið.

Skúlastjórin, sum sjálv er kvinna, heldur, at klædnamótin hjá teimum ungu gentunum og teimum kvinnu ligu lærarunum kunnu órógva dreingirnar. Hon sigur seg eisini hava lagt til merkis, at klædnamótin mangn elvir til happing í skúlanum.

## Noreg hjálpti Bretlandi

Norskir fjølmiðlar hava avdúkað, at Noreg hjálpti Bretlandi við upplýsingum undir krígnum við Argentina um Falklandsoyggjarnar.

Tað er komið fram, at ein norsk lurtistøð fangaði upplýsingar frá einum russiskum fylgisveini um virksemið hjá argentisnka herflotanum. Upplýsingarnar vórðu alt fyri eitt sendar bretum. Sambært fjølmiðlunum vóru norsku upplýsingarnar kanska medvirkandi til, at tað eydnaðist bretum at søkkja argentinska herskipið "Admiral Belgrano". 327 argentinar druknaðu. Spurningurin er nú, um norrskir politikarar vóru vitndi um upplýsingarnar.